HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Týsdagin, 5. apríl 2016 kl. 16:30

Á fundinum vóru: Una Matras, Karin Dahl, Birgir Kass, Bjørghild Djurhuus, Jógvan Arge og Manne Persson

Skrivari: Hans Jón Thomsen

Skrá

Nýtt frá leiðslu/skúla:

Kunnað varð um ætlanirnar hjá skúlastjóranum um nýggja skúlabygnaðin í Hoyvíkar skúla frá komandi skúlaári.

Eftir ætlan verður skúlin skipaður í eina grunddeild, eina miðdeild og eina hádeild eftir summarfrítíðina. Lagt verður upp til, at lærari arbeiðir mest sum burturav í eini deild. Eisini verður arbeitt fram ímóti, at meiri samstarv verður millum "paralellflokkarnar". Hetta kann gerast við, at flokstoymi verður skipað í hvørjum árgangi, og at fakini vera løgd samstundis. Hetta merkir, at tá a.) flokkurin hevur føroyskt á tímatalvuni, tá hevur b.) flokkurin eisini føroyskt. Soleiðis verður í flest øllum fakum.

Eisini var kunnað um, hvørji "fokusøki" vóru sett upp fyri læraraleiklutin í Hoyvíkar skúla. Undir yvirskriftini "uppmøting" verður stórur dentur lagdur á:

- Ábyrgd
- Floksleiðsla
- Yrkisførleiki
- Loyalitetur
- Samstarv

Tað verður skipað fyri starvsfólkasamrøðum í apríl mánaða.

Nýtt frá lærarum:

Nýggjur lærari er settur í starv í Hoyvíkar skúla.

Nýtt frá Tórshavnar kommunu:

Eingin játtan er sett av til uttanduraøki í Hoyvíkar skúla fyri 2016. Arbeitt verður fram ímóti at játtað verður peningur til uttandurøki í Hoyvíkar skúla fíggjarárið 2017.

Nýtt frá foreldraumboðunum:

Una Matras kunnaði um fundin, ið "Heim og skúli" skipaði fyri.

Nógv viðurskifti eru ógreið viðv. hvørjum felagið skal arbeiða við og nógv ivamál vóru reist, hvat "Heim og skúli" skal taka sær av.

Magni á Lakjuni hevði eina framløgu um eina trivnaðarkanning, ið hevur verið í Eysturskúlanum.

Dagbjartur Debes frá hevði eina framløgu um landsroyndirnar í 4. og 6. flokki. Kanning vísir, at lærari, ið hevur linjulestur, ikki fær betri úrslit enn lærari, ið ikki hevur linjulestur. Kanningin vísti eisini, at lesiførleikin ikki er blivin betri, sjálvt um nógv orka er sett av til at fáa lesiførleikan upp.

Ymiskt:

Eftir ætlan skal skúlastýrið í Hoyvíkar skúla skipa fyri einum foreldrafundi fyri foreldraumboðunum í skúlanum. Eitt uppskot til fundarevni var, at skúlastjórin kunnaði um ætlanirnar um nýggja skúlabygnaðin í Hoyvíkar skúla. Hetta skuldi takast upp aftur á næsta fundi.

Av tí at hetta var fyrsti skúlastýrisfundurin hjá nýggja skúlastjóranum í Hoyvíkar skúla, var nógv leysaprát, ið ikki verður fest í frásøgnina frá fundinum.

Fundurin lokin kl. 19:39